# Stóðu ikki Sveis kurl

**Føroyska U–17 landsliðið hevði yvirhøvur ongan møguleika, tá Sveis á heimavølli var mótstøðuliðið**

U–17, EM-UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Eftir javnleikin ímóti Wales varð í Sveis lagt upp til finalu í undankappingarbólkinum, tá Føroyar og Sveis skuldu spæla fríggjakvøldið.

Men har var yvirhøvur eingin spenningur. Sveisiska heimaliðið vísti seg at vera væl betri, enn føroyska liðið var. Bæði mann ímóti manni og í liðavrikinum. Mótstøðumenninir vóru kropsliga betri fyri, teir vóru skjótari, teir dugdu betri við bóltinum, og teir høvdu sera gott spælskil.

Tað vóru ikki farnir fleiri enn tíggju minuttir, tá heimaliðið var frammanfyri 3–0. U–17 landsliðini spæla tvær ferðir fjøruti minuttir, og longu í 41. minutti øktu teir til 4–0. So skoraðu teir aftur í 45., 70. og 76. minutti.

Lagið á føroyska liðnum var sjálvandi einki serligt, og tað gjørdist ikki betri av, at ein av stuðulsspælarunum, miðverjin og stóra frísparkshóttanin, Rasmus Nolsøe, longu eftir tjúgu minuttir noyddist at fara av vøllinum, tí hann var vorðin liðbandsskaddur í knænum.

Tá var neyðugt at gera fleiri broytingar á liðnum. Marni Djurhuus fór av miðvøllinum og í miðverjuna, og Jústinus R. Hansen av høgra vongverja og á miðvøllin, og Bergur Midjord kom inn á vongverjan.

Føroyska liðið var frá fyrsta bríksli mannað við teimum somu ellivu sum ímóti Wales:
Gunnar Nielsen, HB – Jústinus R. Hansen, NSÍ, Eli Thorsteinsson, HB, Rasmus Nolsøe, TB (Bergur Midjord, B36, 19.), Jónas Þór Næs, B36 (Hanus Thorleifsson, Skáli, 51.) – Bárður H. Joensen, HB (Páll M. Joensen, HB, 68.), Símun Samuelsen, VB, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Magnus Skoralíð, GÍ – Jóhan Petur Olsen, B68, Rókur Jespersen, liðformaður, HB

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn sótu Búgvi Øster, EB/Streymur, Allan Kjærbo, VB, Jósup Henriksen, KÍ og Poul N. Poulsen, VB.

# Julian útskiftur

**Hull megnaði enn eina ferð at koma afturíaftur, eftir at tað hevði staðið illa til í 1. hálvleiki**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð síðani hann í summar flutti til Hull City, varð Julian Johnsson útskiftur av taktiskum orsøkum.

Støðan eftir 1. hálvleik var 3–1 til Rushden. Hull var komið á odda, men heimaliðið hevði javnað og lagt seg á odda við tveimum málum. Tí valdi Hull venjarin, Brian Little, at fara radikalt til verka. Hann skifti tríggjar spælarar út, og millum teirra var Julian Johnsson.

Tá tíggju minuttir vóru farnir av seinna umfarinum, stóð á jøvnum 3–3. So fór eitt sindur av dampinum av dystinum. Hull hevði onkran møguleika at fáa sigursmálið, men alt í alt vóru teir nøgdir við eina stigið á útivølli.

# Uppgávurnar eru klárar

**Landsdystir móti Pólandi og Íslandi verða millum fyrstu uppgávuarnar hjá nýggja føroyska landsliðsvenjaranum, sum eisini sleppur at royna seg móti Liktinstein, áðrenn farið verður í holt við komandi EM-undankappingina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum kunnugt er føroyska fótbóltslandsliðið í venjaraloysi í hesum døgum, men hóast tað enn ikki er greitt, hvør verður eftirmaðurin hjá Allani Simonsen, so er FSF í fullarið ferð við at leggja fyrstu avbjóðingarnar hjá hesum til rættis.



*Hóast landsliðsvenjarin enn ikki er settur, so er FSF komið væl áleiðis við fyrireikingunum til komandi landsliðsárið, sum millum annað tykist innhalda ein landsdyst móti Pólandi*

## Landsdyst móti Pólandi

Seinnu árini hevur vanligt, at landsliðsárið byrjar við einari venjingarlegu í februar mánaði, og soleiðis verður eisini í ár.

Ein lítil broyting verður tó hesum viðvíkjandi í ár, tí meðan tað higartil hevur verið í Spania, at venjingarlegan hevur verið hildin, verður ferðamálið eitt sindur meira fjarskotið komandi árið.

Tað er ikki endaliga fastlagt, hvar venjingarlegan verður hildin, men Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur við Sosialin, at talan eftir øllum at døma verður um eina ferð til antin Malta ella Cypern.

Hvørji mótstøðuliðini á ferðini verða, er sum so heldur ikki fastlagt, men gongst eftir ætlan, sleppa leikarar okkara hesa ferð at kunna seg við eitt mótstøðuland, sum teir ikki hava hitt áður.

- Tað liggur í øllum førum í kortunum, at talan verður um ein dyst ímóti Pólandi. Kanska ikki í sterkastu uppstilling, men tað er so tað, sum í løtuni verður arbeitt við, sigur aðalskrivarin.

## Innandura í Íslandi

Annars er mest sum fastlagt, at í øllum førum tveir aðrir vinardystir verða á skránni komandi árið.

Íslendingar fáa komandi ár ein áragamlan dreym uppfyltan, tá ein innandura fótbóltsvøllur í fullari stødd verður vígdur í Reykjavík. Íslendska fótbóltssambandið hevur tosað við FSF, um at Ísland og Føroyar skulu spæla fyrsta almenna dystin í høllini, og í løtuni bíðar FSF bara eftir, at formliga innbjóðingin frá íslendingum fer at koma við postinum.

Eisini eiga Føroyar ein dyst móti Liktinstein til góðar, eftir at Føroyar tann 26. apríl í fjør vitjaðu hjá smátjóðini. Ta ferðina vunnu okkara menn ein tepran 1-0 sigur, so líkt er til, at nýggi venjarin í øllum førum eina ferð sleppur at royna leiklutin sum favorittur.

Hvussu verður við øðrum landsdystum komandi árið, veldst sjálvsagt um lutakastið til komandi EM-undankappingina, men tað liggur tó fast, at vit neyvan skulu gera okkum vónir um at fáa eins nógv stig tá, sum vit fingu í júst lidnu HM-undankappingini. UEFA hevur nevnliga stungið út í kortið, at talan hesa ferð verður um 10 bólkar, og hetta merkir so aftur, at Føroyar neyvan fáa høvi til at hitta onnur lond, ið á sama hátt, sum vit gera tað, liggja heilt niðarliga á altjóða styrkislistanum.

# Óli misti á stokkinum

**B93 kom á odda, men tapti stórt ímóti oddaliðnum, og Hvidovre fekk tvey mál ímóti sær í síðsta minutti**

DANMARK, 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Føroysku landsliðsspælararnir í næstbestu deildini í Danmark fingu einki stig sunnudagin, og nú eru bæði B93 og Hvidovre av álvara farin at kenna hitan av niðurflytingarstrikuni. Tað stendur betri til hjá Randers Freja og Atla Gregersen, sum sunnudagin vunnu 3–2 á útivølli ímóti Skive.

B93 hevur síðstu vikurnar mist fýra av bestu spælarunum, sum nú fáa løn í øðrum feløgum. Sunnudagin vitjaði oddaliðið í bestu deildini. Køge hevur í fleiri ár havt úrslit fram ímóti uppflyting.

B93, sum hevði Øssur Hansen á liðnum allar 90 minuttirnar, kom á odda, men Køge javnaði stutt undan hvíldini. Eftir steðgin kom týðuliga til sjóndar, at á B93 liðnum eru nógvir ungir spælarar. Køge vann 5–1.

Í Hvidovre var Óli Johannesen á liðnum allar 90 minuttirnar. Hvidovre hevði fleiri møguleikar at leggja seg á odda, og teir kendu seg í tveimum førum snýttar fyri brotsspark. HFK Sønderjylland vardi og lúrdi eftir møguleikunum fyri snarálopum, og síðstu lítlu løtuna skoraðu teir tvey mál. Á dómaraseðlinum eru bæði málini skrivað at verða skorað í 90. minutti!



# Støður uttanlands

## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 13 | 9 - 3 - 1 | 32 | 6 | 26 | 30 |
| 2 | AaB | 12 | 8 - 2 - 2 | 21 | 14 | 7 | 26 |
| 3 | Esbjerg | 13 | 8 - 1 - 4 | 21 | 19 | 2 | 25 |
| 4 | FCK | 13 | 7 - 3 - 3 | 20 | 11 | 9 | 24 |
| 5 | AB | 13 | 5 - 6 - 2 | 22 | 13 | 9 | 21 |
| 6 | FCM | 13 | 4 - 6 - 3 | 15 | 12 | 3 | 18 |
| 7 | OB | 13 | 4 - 4 - 5 | 18 | 20 | -2 | 16 |
| 8 | Lyngby | 13 | 2 - 6 - 5 | 13 | 21 | -8 | 12 |
| 9 | Viborg | 12 | 2 - 5 - 5 | 13 | 16 | -3 | 11 |
| 10 | Vejle | 12 | 2 - 4 - 6 | 14 | 27 | -13 | 10 |
| 11 | AGF | 12 | 1 - 5 - 6 | 9 | 21 | -12 | 8 |
| 12 | Silkeborg | 13 | 0 - 3 - 10 | 9 | 27 | -18 | 3 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Johan Byrial Hansen (OB), Chrsitan Høgni Jacobsen (Esbjerg)

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 12 | 10 - 1 - 1 | 28 | 10 | 18 | 31 |
| 2 | Farum | 12 | 7 - 4 - 1 | 29 | 16 | 13 | 25 |
| 3 | HFK Sønderj. | 12 | 7 - 3 - 2 | 24 | 14 | 10 | 24 |
| 4 | Frem | 12 | 6 - 5 - 1 | 27 | 14 | 13 | 23 |
| 5 | Herfølge | 12 | 6 - 4 - 2 | 18 | 10 | 8 | 22 |
| 6 | AC Horsens | 12 | 5 - 5 - 2 | 15 | 10 | 5 | 20 |
| 7 | B 1913 | 12 | 6 - 2 - 4 | 22 | 21 | 1 | 20 |
| 8 | Randers F. | 12 | 5 - 4 - 3 | 21 | 16 | 5 | 19 |
| 9 | B93 | 12 | 3 - 3 - 6 | 20 | 23 | -3 | 12 |
| 10 | Brønshøj | 12 | 3 - 3 - 6 | 19 | 26 | -7 | 12 |
| 11 | B 1909 | 12 | 3 - 3 - 6 | 19 | 30 | -11 | 12 |
| 12 | FC Aarhus | 12 | 2 - 5 - 5 | 14 | 18 | -4 | 11 |
| 13 | Hvidovre | 12 | 2 - 5 - 5 | 14 | 22 | -8 | 11 |
| 14 | Kolding IF | 12 | 2 - 1 - 9 | 19 | 34 | -15 | 7 |
| 15 | Fredericia | 12 | 1 - 3 - 8 | 14 | 21 | -7 | 6 |
| 16 | Skive | 12 | 1 - 3 - 8 | 14 | 32 | -18 | 6 |

Føroyskir leikarar: Óli Johannesen (Hvidovre), Øssur Hansen (B93), Atli Gregersen (Randers Freja)

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 25 | 16 - 6 - 3 | 65 | 28 | 37 | 54 |
| 2 | Lillestrøm | 25 | 16 - 5 - 4 | 61 | 32 | 29 | 53 |
| 3 | Viking | 25 | 14 - 6 - 5 | 42 | 28 | 14 | 48 |
| 4 | Molde | 25 | 13 - 4 - 8 | 53 | 40 | 13 | 43 |
| 5 | Stabæk | 25 | 13 - 3 - 9 | 43 | 38 | 5 | 42 |
| 6 | Brann | 25 | 12 - 5 - 8 | 61 | 42 | 19 | 41 |
| 7 | Odd. Grenl. | 25 | 11 - 6 - 8 | 46 | 38 | 8 | 39 |
| 8 | Bodø/Glimt | 25 | 7 - 8 - 10 | 43 | 44 | -1 | 29 |
| 9 | Moss | 25 | 9 - 2 - 14 | 34 | 46 | -12 | 29 |
| 10 | Sogndal | 25 | 8 - 5 - 12 | 42 | 59 | -17 | 29 |
| 11 | Lyn | 25 | 6 - 8 - 11 | 39 | 46 | -7 | 26 |
| 12 | Bryne | 25 | 5 - 4 - 16 | 30 | 60 | -30 | 19 |
| 13 | Strømgodset | 25 | 3 - 10 - 12 | 38 | 69 | -31 | 19 |
| 14 | Tromsø | 25 | 4 - 4 - 17 | 22 | 49 | -27 | 16 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excel-soir + | 10 | 9 - 1 - 0 | 20 | 3 | 17 | 28 |
| 2 | FC Zwolle | 10 | 7 - 2 - 1 | 19 | 9 | 10 | 23 |
| 3 | Emmen | 10 | 6 - 3 - 1 | 20 | 12 | 8 | 21 |
| 4 | RBC Roos'daal | 10 | 5 - 3 - 2 | 19 | 11 | 8 | 18 |
| 5 | ADO Den Haag | 10 | 5 - 3 - 2 | 13 | 7 | 6 | 18 |
| 6 | BV Veendam | 10 | 5 - 2 - 3 | 18 | 16 | 2 | 17 |
| 7 | FC Volendam | 10 | 4 - 2 - 4 | 21 | 15 | 6 | 14 |
| 8 | Storm/Telstar | 10 | 4 - 2 - 4 | 18 | 14 | 4 | 14 |
| 9 | Cambuur/L. | 10 | 4 - 2 - 4 | 14 | 11 | 3 | 14 |
| 10 | Heracles A. | 10 | 4 - 1 - 5 | 16 | 14 | 2 | 13 |
| 11 | VVV | 10 | 4 - 0 - 6 | 20 | 21 | -1 | 12 |
| 12 | Haarlem | 10 | 3 - 3 - 4 | 15 | 16 | -1 | 12 |
| 13 | MVV | 10 | 3 - 2 - 5 | 16 | 19 | -3 | 11 |
| 14 | Dordrecht '90 | 10 | 2 - 3 - 5 | 16 | 18 | -2 | 9 |
| 15 | G.A. Eagles | 10 | 1 - 5 - 4 | 18 | 22 | -4 | 8 |
| 16 | Helmond Sp. | 10 | 1 - 4 - 5 | 5 | 16 | -11 | 7 |
| 17 | Top/Oss | 10 | 2 - 1 - 7 | 7 | 28 | -21 | 7 |
| 18 | Eindhoven | 10 | 0 - 3 - 7 | 8 | 31 | -23 | 3 |

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

## Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rochdale | 14 | 9 - 3 - 2 | 21 | 11 | 10 | 30 |
| 2 | Plymouth | 14 | 8 - 4 - 2 | 22 | 10 | 12 | 28 |
| 3 | Luton | 14 | 8 - 3 - 3 | 30 | 16 | 14 | 27 |
| 4 | Hull | 13 | 7 - 5 - 1 | 24 | 12 | 12 | 26 |
| 5 | Mansfield | 14 | 7 - 4 - 3 | 22 | 17 | 5 | 25 |
| 6 | Shrewsbury | 13 | 7 - 3 - 3 | 23 | 17 | 6 | 24 |
| 7 | Darlington | 13 | 5 - 4 - 4 | 19 | 14 | 5 | 19 |
| 8 | Cheltenham | 13 | 5 - 4 - 4 | 18 | 15 | 3 | 19 |
| 9 | Bristol R. | 13 | 5 - 4 - 4 | 13 | 14 | -1 | 19 |
| 10 | Scunthorpe | 14 | 4 - 6 - 4 | 18 | 15 | 3 | 18 |
| 11 | Leyton O. | 14 | 5 - 3 - 6 | 18 | 21 | -3 | 18 |
| 12 | Torquay | 14 | 5 - 3 - 6 | 12 | 18 | -6 | 18 |
| 13 | Lincoln C. | 14 | 4 - 5 - 5 | 16 | 15 | 1 | 17 |
| 14 | Southend | 14 | 5 - 2 - 7 | 17 | 18 | -1 | 17 |
| 15 | York | 14 | 5 - 2 - 7 | 19 | 23 | -4 | 17 |
| 16 | R&D | 14 | 3 - 7 - 4 | 13 | 14 | -1 | 16 |
| 17 | Macclesfield | 14 | 3 - 6 - 5 | 11 | 16 | -5 | 15 |
| 18 | Oxford Utd. | 14 | 3 - 5 - 6 | 13 | 15 | -2 | 14 |
| 19 | Kidderm. | 14 | 3 - 5 - 6 | 6 | 15 | -9 | 14 |
| 20 | Halifax | 14 | 3 - 5 - 6 | 7 | 17 | -10 | 14 |
| 21 | Swansea | 14 | 3 - 4 - 7 | 20 | 26 | -6 | 13 |
| 22 | Carlisle | 14 | 3 - 4 - 7 | 13 | 20 | -7 | 13 |
| 23 | Exeter | 14 | 3 - 4 - 7 | 17 | 31 | -14 | 13 |
| 24 | Hartlepool | 13 | 3 - 3 - 7 | 13 | 15 | -2 | 12 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull City)

